


*Nr. 9* *28. apríl 2013* *73. árg.*

# Fyrsta krossarorðið

Fyrsta orðið, sum Jesus sigur, er hetta: "Faðir, fyrigev teimum; tí at teir vita ikki, hvat teir gera!" Jesus veit, at teir gera hetta av fávitsku. Tað er ikki ein køld og grov gerð, sum liggur aftan fyri, men ein neyðarslig og stuttskygd gerð. Jesus visti jú, at Hann var komin til jarðar at doyggja á einum krossi, hetta var Guds frelsuætlan fyri mannaættina. Tí sigur Jesus í Jóh. 10,17-18:

"Tí elskar faðirin meg, at eg seti lív mítt til fyri at taka tað aftur. Eingin tekur tað frá mær; men eg seti tað til av mær sjálvum. Eg havi vald til at seta tað til, og eg havi vald til at taka tað aftur. Hetta boðið fekk eg frá faðir mínum."

Hesin tankin, at tað ræðuliga, sum varð gjørt móti Jesusi, varð gjørt í fávitsku, gongur gjøgnum alt Nýggja Testamenti. Pætur segði við fólkið seinni: "Nú veit eg, brøður, at tit gjørdu tað av vankunnu." Áps. 3,17. Paulus segði, at teir krossfestu Jesus, av tí at teir ikki skiltu, hvør ið hann var. Áps. 13,27.

Tað er ræðuligt, alt tað, sum jødafólkið hevur liðið, av tí at teir krossfestu Jesus. Tey eru kollektivt vorðin revsað, og tey kristnu hava hatað tey fyri júst hetta. Men ein slíkur hugburður er meiningsleysur og óevangeliskur. Jesus, Pætur og Paulus løgdu dent á hetta: "Teir vita ikki, hvat teir gera." – "Teir gjørdu tað av vankunnu." – "Teir skiltu ikki, hvør ið hann var."

Tað lá eitt skýli yvir eygunum á jødum, so teir ikki kundu trúgva. Men Jesus kom til jarðar sum jødi, og í byrjanini trúði jødafólkið, at Messias, Frelsarin, bara var fyri jødar. Men Guds ætlan var størri, vit skuldu eisini gerast ein partur av Guds familju!

Lat meg taka samanum Jesu fyrsta orð: Tað snýr seg um fyrigeving. Tað er alneyðugt hjá okkum at fáa Guds fyrigeving. Hon spreingir mørk.

Sten Sørensen.
*Effie Campbell* umsetti.

# Bygg títt egna Kapernaum!

Johannes Amritzer

Pápi mín er eysturríkari, og mamma mín er svensk. Bæði vóru alkoholikarar. Einaferð, tá ið eg var í Eysturríki og inni hjá ommu, sat øll familjan rundan um køksborðið. Tey royktu og guvaðu so illa, at tú sást ikki andlitini hinumegin borðið. Tey spældu kort, og tómar og hálvfullar ølfløskur stóðu á borðinum. Tey prátaðu óført. Onkur segði: "Í okkara familju doyggja øll av krabba!" – "Ja, og í okkara familju eru flest øll alkoholikarar!" legði ein annar afturat!" – "Í okkara familju har er annarhvør fráskildur!" legði ein triði uppí. "Ja," segði ein fjórði, "tey, sum ikki doyggja av krabba, tey doyggja av hjartanum." – "Løgið er tað, men í okkara familju er tað eingin, sum fær sær eina universitetsútbúgving!" segði ein fimti.

Tað bylgdist innan í mær at sita og lurta eftir hesum skvaldrinum. Eg var ungur og nýumvendur, so eg dugdi ikki at svara teimum aftur út frá Guds orði. At enda eksploderaði eg. Stólurin skøvaði eftir gólvinum, tá ið eg reisti meg upp og rópti, so hart eg orkaði: "Tala fyri tykkum sjálv. Eitt nýtt ættartræ byrjar við mær!"

Jesus varð føddur í Betlehem. Hann vaks upp í Nasaret. Hann livdi og virkaði í Kapernaum. Hann doyði í Jerusalem. Hvussu mundi tað vera at búgva í Nasaret? Einki serligt, har ráddi ein keðiligur andi. Latið okkum hyggja í Markus kap. 6. Jesus fer inn í samkomuhúsið og fer at tala. Beinanvegin er bygdarfólkið upp á vakt. "Er hetta ikki sonur Jósef, træsmiðin. Vit kenna brøður og systrar hansara! Hvat billar hann sær inn? Hvat heldur hann seg vera?" Vit kenna alt fyri eitt tann skeiva andan, her ræður jantelógin. Úrslitið gjørdist, at hann kundi ikki gera nakra kraftargerð har. Hann legði bara hendurnar á nøkur fá sjúk og grøddi tey. Undurgerðir bróta ikki ígjøgnum, har ein neiligur andi ræður.

Tá var tað øðrvísi í Kapernaum. Har trongdu fólk seg yvir til Jesusar og numu við klædnafald hansara, og tey vórðu grødd. Onnur komu berandi við sínum sjúku, Jesus segði eitt orð, og tey gjørdust frísk. Nú var ikki neyðugt hjá honum at leggja hondina á høvdið á teimum og biðja sum í Nasaret.

Hvussu bar tað til? Jú, tí tey vóru so jalig. Vit møta tí sama, tá ið Jesus vekur upp dóttir Jairusar. Hann leggur dent á, at bara foreldrini og lærusveinarnir skuldu koma við inn, har gentan lá. Øll hini, sum grótu og illa lótu, vórðu rend á dyr. Eingin álvarsom sorg lá aftan fyri handa grátin, tí løtu seinni fóru tey at flenna at Jesusi.

"Deyði og lív eru í tungunnar valdi." Orðt. 18,21. Tað merkir, at tú kanst t.d. tosa so nógv um sjúkur, at tú at endanum gerst sjúk, og øvugt,

tosar tungan positiv orð, so fremur tað lív. Guds orð í munni okkara fremur tað, sum tað nevnir, stendur í Jes. 55,11, og: “Hann, sum kallar tað, sum ikki er til, sum var tað til.” Róm. 4,17. Víðari lesa vit í Skriftini: “Liggja tær (leiðir tínar) omaneftir, skalt tú siga: “Niðaneftir”.” Job 22,29 V.D. við øðrum orðum: lat væl at og grenja ikki, tí lív er í tungunnar valdi. Hetta er ein bíbilskur sannleiki.

Heima hjá okkum hava vit bygt eitt Kapernaum. Eg havi havt bíbliutímar við mínari familju og undirvíst teimum í at vera sum fólkini í Kapernaum, so ein trúarandi, ein positivur andi er inni hjá okkum. Vit royna at varða okkara munn. Vit tosa tað, sum vit eru í Kristusi: Jesus hevur frelst meg frá banning. Hann hevur givið mær navn sítt. Í mínari ætt doyggja tey ikki av krabba. Eg eri ein kongssonur.

Vit eru Jesus-fokuserað og fylt við eyðmýkt og takksemi fyri tað, sum Jesus hevur gjørt fyri okkum. Og hvussu hevur tað so gingið? Bæði míni foreldur eru herliga frelst og meginparturin av allari familjuni. Harafturat hava vit stovnsett eina rúgvu av meinigheitum kring allan heim. Tær verða nevndar SOS-kirkjur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvar finnur tú lukkuna?

Ikki í vantrúgv - Voltaire var vantrúgvandi, men hann skrivaði: “Eg vildi, at eg ongantíð varð føddur.”

Ikki í stuttleikum - Lord Byron livdi lív sítt í lystum og stuttleikum. Hann skrivaði: “Glatan og pína er hitt einasta, sum eg kann kalla mítt.”

Ikki í at hava nógvar pengar - Jay Gould, ein amerikanskur margmillióningur, sum læt eftir seg nógvar ognir, segði á deyðastrái: “Eg haldi, eg eri hin ólukkuligasti skapningur á jørð.”

Ikki í æru og rós - Lord Beaconsfield fekk bæði tvey, men skrivaði: “Ungdómurin er eitt mistak, manndómurin eitt stríð, og aldurdómin angrar tú.”

Ikki í at vinna - Alexander mikli vann allan tann tá kenda heimin. Tá ið hann hevði vunnið alt, funnu teir hann ein dagin grátandi í tjaldi sínum, tí, sum hann segði: “Nú er ikki meir hjá mær at vinna!”

So kanst tú spyrja: “Hvar er lukkan so at finna?”

Guds orð - Bíblian - sigur: “Tann, sum gevur gætur eftir orðinum, finnur lukku, og sælur er tann, sum lítur á Harran.” Orðt. 16,20.

*Effie Campbell* umsetti.

# Annað krossarorðið

*Annað krossarorðið er: "Í dag skalt tú vera við mær í páradís!"*
*Luk. 23,43.*

Ránsmaðurin fekk nógv meira, enn hann bað um. Hann bað um ein tanka: "Minst tú til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!" Men hann fekk Páradís!!

Hann fekk tað týdningarmesta, sum hann kundi fáa. Nevniliga ein ævinleika saman við Jesusi! Henda frásøgnin sigur eisini, hvussu týðandi Jesus er fyri okkum. Ránsmaðurin hevði einki at koma við. Hann hevði onga sterka trúgv. Hann fekk ikki gjørt nakrar góðar gerðir. Lívið var liðugt fyri hansara viðkomandi. Men tað var tá, at tað rættiliga byrjaði!! Jesus gjørdist bjargingin, og hann fekk pláss í Páradísi.

Jesu gerningur fyri okkum á krossinum fær týdning fyri hetta lívið. Men tað týdningarmesta er, at Hann hevur latið ein veg upp fyri okkum til Páradís! Vit fara at arva Guds Himmal!

Sten Sørensen.
*Effie Campbell* umsetti.

# Oblatin

Gunnar Prestegård

Tá ið vit fara til altars, fáa vit eina oblat, eitt slag av einari "keks", kanst tú siga. Á hesari oblat er ein mynd við Jesusi á krossinum, og oblatin er formað sum eitt pengastykki, ein mynt. Veitst tú hví? Í Matt. 20,28 stendur: "Menniskjusonurin er komin ... at geva lív sítt sum loysigjald fyri mong.

*E. Campbell* umsetti.

---

Kraddaralyndi hevur mong andlit, men talar bara eitt mál: "meiramálið". Epikur skrivaði: "Einki er nokk fyri tann, sum heldur, at nokk er ov lítið."

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 28. apríl. | Tekstur: | Luk. 18,9-14; | bíbliuorð: | Matt. 7,7 |
| 5. mai. | Tekstur: | Matt. 14,22-34 | bíbliuorð: | Matt. 14,27b |
| 12. mai. | Tekstur: | Áps. 1,6-11 | bíbliuorð: | Áps. 1,8b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74